# Føroyingar og russar styrkja samstarvið



*Árni Dam, v.m., hevur í mong fingist við russisk skip, og hann hevur nógv gott at bera russum*
*Mynd: Jens Kristan Vang*

**Í løtuni hava føroyingar tætt samstarv við Russland. Við nýggja handilssáttmálanum og støðuga talinum av vitjandi russiskum skipum, tykist áhugin frá russiskari síðu at vera stórur og vaksandi. Næsta stigið verður væntandi ein russiskur konsul í Føroyum**

SAMSTARV
*Heri á Rógvi*

Russisku skipini í Nólsoyarfirði eru ein sjón, sum flest øll kenna aftur. Hesi, oftani rustaðu skipini, mynda saman við nøkrum trolarum partin av tí russiska flotanum, ið vitjar í Føroyum. Hetta eru stór skip við nógvum fólki umborð, og tey kasta eisini eitt sindur av sær í havna- og landskassan. Hesi góðu skip eru tað, sum vit føroyingar síggja mest til av handilssamstarvinum við Russland. Skipini eru aloftani heldur ikki so illa fyri, sum flest okkara helst halda, heldur Ivan Eginsson, skipsagentur á Skipafelagnum, fyri.

Samstarvið við Russland, og harvið russisku skipini, er ikki nakað nýtt hugtak í føroyskari handilssøgu, tá ið samstarv og samhandil við russar gongur nógv ár aftur í tíðina. Í dag hava russar stórar kvotur í føroyskum sjógvi, og eisini verður tann sokallaði russarafiskurin virkaður í Føroyum.

## 350 um árið

Tað felagið, sum hevur einamest samband við russar og serstakliga russisk fiskifør, er Skipafelagið Føroyar. Ein partur av virkseminum hjá fyritøkuni er at virka sum agentar fyri skip. Av teimum umleið 500 førunum, sum teir taka sær av um árið, so eru eini 350 av hesum russisk, ella gott og væl tveir triðjingar. Uppgávan hjá agentunum er at vera forlangdi armurin hjá reiðarínum, tá ið skipini vitja í Føroyum. Agentarnir skulu taka sær av øllum praktiskum viðurskiftum, eins og teir skulu skipa fyri, at skip og skipari fáa allar vørur og annað, sum teimum tørvar. Eisini kemur tað fyri, at onkur skal hava læknahjálp av onkrum slag. Tað er tó vorðið alsamt meira sjálvsamt, at menn umborð á skipunum loypa fyri borð, svimja til lands og biðja um politiskt friðskjól.

Á Clearence and Agency deildini hjá Skipafelagnum, sum tekur sær av at umboða útlendsku skipini í Føroyum, starvast fýra fólk. Tað er einamest russiskt-føroyski Ivan Eginsson, sum tekur sær av teimum vitjandi russisku skipunum. Hansara uppgáva er at fara umborð á tey russisku skipini. Umborð greiðir hann øll pappírini og samskiftir við skiparan um, hvørji ynskir hann og manning nú einaferð hava. Tá vitjaninar frá russiskum skipum eru so nógvar og títtar, so er tað rættiliga javnan, at hann vitjar umborð á skipunum.

Ivan greiðir frá, at Skipafelagið hevur serkunnleika við russiskum viðurskiftum, og hetta eisini er nakað, sum skipini seta stóran prís uppá.

Deildarleiðari fyri agency deildina er Árni Dam. Umframt Árna og Ivan eru eisini Karl Erik Reynheim, Maria á Lava og Halgir Dahl-Olsen. Hann hevur verið virkin við hesum slagi av virksemi í nógv ár. Hann greiðir frá, at Skipafelagið hevur at kalla alla sína tíð havt tætt samband við Russland. Tað fyrsta hann minnist er sildahandilin, sum byrjaði í 1947. Síðani hava russar mynda stóran part av vitjandi fiskiførunum í føroyskum sjógvi. Bæði Árni og Ivan eru samdir um, at tað tykist sum um, at russar eru glaðir fyri føroyingar og at samstarva við føroyingar. Teir halda eisini, at hetta er eitt vinnu- og vinasamstarv, sum føroyingar so avgjørt eiga at hugsa um at útbyggja og styrkja. Í hesum sambandi nevna teir eisini, at Skipagfelagið bæði hevur verið og ynskir at vera ein týðandi millumliður millum Føroyar og Russland. Tá russar hava vitjað í Føroyum, so hevur Skipafelagið eisini verið við í samskiftinum við russar.

Teir halda fyri, at russar hava verið millum teir frægastu at stuðla og birta lív í føroyska vinnu. Samstundis siga teir ikki nógvan sannleika vera í leysasøgunum um, at russisku skipini ikki gjalda fyri seg og eru í ógvuliga ringum standi.

## Konsulat

Sambært galdandi avtalum, kunnu russar fiska 105.000 tons av svatkjafti og 10.000 tons av makrel í føroyskum sjógvi. Føroyingar kunnu fiska 8.200 tons av toski, 10.000 av lodnu umframt hýsu, flatfisk og rækir í russiskum sjógvi, hetta upplýsir Ulla Svarrer Vang, fulltrúi í fiskimálastýrinum. Sum áður nevnt, virka føroysk flakavirki eisini eitt sindur av tí sokallaða russarafiskinum. Kvoturnar byggja á fiskivinnusamstarv landanum millum.

Í summar sessaðust russar og føroyingar aftur við samráðingarborðið fyri at samráðast um ein MFN-sáttmála, t.e. most favored nation. Hesin sáttmálin fer at merkja, at føroyingar og russar veita hvørjum øðrum lægsta toll og avgjøld. Tað ber kanska til at siga, at hetta er tað tættasta tú kemur upp at einum fríhandilssáttmála.

Herluf Sigvaldsson, leiðari fyri uttanlandsdeildina hjá løgmansskrivstovuna, sigur, at samráðingar sum so eru lidnar, og ætlanin er nú at fara yvir til Russlands at undirskriva, men hetta er eitt mál, sum meira liggur hjá russum og dønum í løtuni.

Árni Olafson á danska uttanríkismálaráðnum, sigur, at sáttmálin væntandi verður undirskrivaður í ár yviri í Russlandi.

Tá hesin sáttmálin er undirskrivaður verður væntandi farið undir at samráðast um ein fríhandilssáttmála.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, greiðir frá, at tað enn ikki er settur nakar dagur, nær farið verður avstað ella hvør skal við yvir til Russlands. Hann sigur, at tað møguliga eisini vera partar av vinnuni við á ferðini yvir.

Bæði Anfinn Kallsberg og Árni Olafson kenna til tankan um ein russiskan konsul í Føroyum, men hetta er danskt málsøki. Eftir hvat Sosialurin skilir, so verður russiski konsulin tilnevndur í sambandi við føroysku vitjanina í Russlandi. Tað eydnaðist tó ikki at fáa hetta váttað, áðrenn blaðið fór til prentingar.



*Ivan Eginsson, sum upprunaliga er úr Russlandi, tekur sær nógv av russiskum skipum fyri Skipafelagið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*





*Fráfarandi nevndin í felagnum: a.f.v.: Michael Reveal, Max C. Weihe, Ólavur Gregersen og Lynn Reveal*
*Mynd: Heri á Rògvi*

# Á fundi hjá føroyska-amerikanska vinafelagnum

**Hóskvøldið hevði føroyskt-amerikanskt vinafelag aðalfund. Felagið er ikki millum tey størstu feløgini í landinum, men tað er virkið kortini. Undirtøkan var heldur ikki eingin, tá aðalfundurin varð hildin eftir føroyskt-amerikonskum leisti**

VINAFELAG
*Heri á Rógvi*

Spyrt tú teg sjálvan, hvussu nógvar amerikanarar tú kennir í Føroyum, so er talið kanska ikki nakað stórvegis stórt. Tá formaðurin fyri føroyska-amerikanska vinafelagi fer at telja eftir, so liggur einastaðni millum 5 og 7. Men hetta nervar hann tó ikki nakað stórvegis, tá ið tað ikki er eitt amerikanarafelag, sum hann er formaður fyri. Formaðurin fyri felagið er Michael P. Reveal, sum flestu føroyingar kanska kenna frá hansara løtum í útvarpi fyri fáum árum síðani. Umframt Michael, so telur nevndin í felagnum fýra aðrar limir: Max C. Weihe, Kára Heinesen, Ólavur Gregersen og Lynn Reveal.

Søgan hjá felagnum er frá 24. mai 2000 í teirri søguligi stund, tá Føroyskt-Amerikanskt Vinafelag varð sett á stovn. Síðani tá hevur felagið havt ymsar fundir, og største hendingin hjá felagnum higartil er, tá amerikanski sendiharrin í Danmark kom til Føroya, og felagið var vertur fyri einari móttøku í Listaskálanum. Á øðrum fundum hjá felagnum hava fólk, sum hava havt ymisk tilknýti til USA verið við, entin tað hava fólk, ið hava búleikast yviri í Sambandsríkinum ella onnur, sum kanska hava steðgað har í styttri tíð í sambandi við útbúgvin ella annað.

Hóast felagið eitur føroyskt-amerikanskt vinafelag, so halda tó fast í føroyskum siði at møta ov seint og ikki byrja fundin stundisliga. Í felagnum er tað flest føroyingar, sum eru limir. Hesir kunnu á einhvønn hátt hava áhuga ella samband við risastóra landið vestan hav. Sjálvur er Michael Reveal amerikumaður, og eisini aðrir við sama statsborgararætti sum hann vóru á fundinum. Fundurin var fyri tað nógva ein formellur fundur, har nýggja nevnd skuldi veljast, og roknskapurin skuldi gjøgnumgangast og góðkennast. Áhugin var sum so ikki lítil, tá hugsað verður um, at hetta felagið ikki júst ger so nógv um seg alment. Fundurin varð hildin í góðum umstøðum á Hotel Hafnia.

Á fundinum segði Kári á Rógvi eisini frá upplivingum og hugleiddi leingi frá túrinum við Grundlógarnevndini(Faroese Constitutional Committy) yviri í Sambandsríkinum.

Felagið hevur í skrivandi stund ikki eitt ovurstórt tal av limum, men fráfarandi nevndin eggjar øllum áhugaðum til at gerast limir. Áhugaði kunnu venda sær til Michael Reveal.

Størsta skuffilsi á fundinum var, at einki var tosa um tað nú var rætt at loypa á Afghanistan ella ikki. Heldur ikki prát var um amerikanska forsetan ella um aðrar amerikanska mentanarligar dýrgripir.



*Kári á Rógvi tosaði á fundinum um túrin hjá Grundlógarnevndini yviri í USA*

# Veirurin brast í andlitið

*– Veirurin rakti akkurát har, hann skuldi raka. Hevði hann rakt í høvdið, so hevði tað neyvan endað soleiðis. Eg kundi eisini havt fingið ein stórt lás, sum var á veirinum í høvdið, so eg eri fegin um, at eg hóast alt kom væl burtur úr hesum, sigur John Petersen, sum er fegin um at síggja dóttir sína aftur og kann vera við til 1 ára føðingardagin hjá Anni í dag*



**Gøtumaðurin John Petersen er fegin um at vera komin heim til konuna og dóttrina á lívi, eftir at hann fekk ein ógvusligan snudd í andlitið umborð á trolara á Føroyabanka**

ÓHAPP
*Eyðun Klakstein*

Hann náddi ikki at reagera, tá hann fekk veirin í andlitið og fór sendandi eftir dekkinum.

Gøtumaðurin John Petersen metir seg vera sera hepnan, hóast hann hevur brotið stóran part av vinstra kjálka, er hovin um alt andlitið og er seymaður við nógvum pentum í vanganum.

– Tað kundi endað nógv verri. Eg eri bara fegin um, at eg eri komin heim í øllum góðum, sigur John Petersen.

Seinastu dagarnar hevur hann hildið frí í Klaksvík, haðani kona hansara, Eydna, er ættað, og hann hevur verið nógv saman við dóttrini Anni, sum fyllir eitt ár í dag.

## Tók kjansin

Søgan byrjar mánadagin, tá teir umborð á Tróndi í Gøtu skulu draga trolið.

John Petersen var fyrstu ferð við trolaranum í fjør, og hann hevur verið við meginpartin av hesum árinum sum avloysari. Hann er raskur og íðin, og slíkum manni er brúk fyri.

John skuldi krøkja eitt lás av veirinum, sum dregur trolið. Veirurin í tí síðuni, sum John stóð, fór skeivur á dekkinum, tí skipið vendi sær eitt sindur í sjónum.

– Eg eigi ikki at fara út á trolbanan, men bíða til veirurin kemur upp á pláss aftur. Tað hevði eg ikki tol til. Veirurin er 120 sentimetrar upp frá dekkinum, og tí kreyp eg út ímóti honum. Tað ræður um at ansa sær, tí tá veirurin fer aftur upp á pláss, skjýtur hann við stórari ferð, og tá er ikki lukkuligt at vera fyri, greiðir John frá.

– Eg noyddist at reisa meg eitt sindur upp, tá eg skuldi krøkja av, og eg helt meg velja røttu løtuna, men í tí at eg skuldi krøkja av, brast veirurin í andlitið á mær.

– Eg fór sendandi eftir dekkinum, og meðan eg merkti, hvussu kjálkin doyvdist og ein pína breddi seg upp í høvdið, hugsaði eg, er tað soleiðis at doyggja.

– Tað fara nógvir tankar gjøgnum høvdið eina slíka løtu. Eg hugsaði um familjuna heima, og eg bað nógv fyri at yvirliva og koma heimaftur.

## Glaður um at verða á lívi

John Petersen misti ongantíð vitið, og hann visti í fyrstuni ikki, hvat var hent honum. Pínan var einki at tosa um, men kjálkin kendist doyvdur.

– Eg hugsaði, at her var ikki alt í lagi, og eg fór upp til kokkin fyri at fáa okkurt at køla av við. Tá eg hugdi í spegl, sá eg, at ein partur av kjálkanum var trýstur inn. Og so kom pínan so líðandi og gjørdist øðilig til endan, sigur John.

Teir høvdu beinanvegin samband við lækna og settu kós móti Suðuroynni. Á sjúkahúsinum á Tvøroyri varð John kannaður, og morgunin eftir varð hann lagdur undir skurð á Landssjúkrahúsinum. Hetta var gjørt fyri at fáa brotini í kjálkunum upp á pláss aftur.

– Eg var sera fegin, tá eg vaknaði aftur. Eg var glaður um at vera á lívi, og pínan var eisini minkað, sigur John.

## Kundi verið verri

John hevur ikki mist hugin at verða til skips, hóast óhappið bara er fáar dagar gamalt.

– Tá vit sigldu inn, og kokkurin royndi at tosa við meg fyri at halda meg vaknan, segði eg, at nú fór eg helst at missa kjansin av hesum. Nei, tað skuldi eg ikki hugsa um. Eg skuldi bara blíva frískur aftur, sigur John.

– Eg vil gjarna til skips aftur, men eg havi lært, at tað ræður um at ansa sær betur. Eg hevði sjálvur skyldina av óhappinum, tí eg skuldi ikki verið farin út á trolbanan.

Andlitið á John er framvegis hovið og merkt av ógvusliga stoytinum, og hóast hann fær illa smílst orsaka av nógvu brotunum í kjálkanum, so er hann ein fegin maður.

– Veirurin rakti akkurát har, hann skuldi raka. Hevði hann rakt í høvdið, so hevði tað neyvan endað soleiðis. Eg kundi eisini havt fingið ein stórt lás, sum var á veirinum í høvdið, so eg eri fegin um, at eg hóast alt kom væl burtur úr hesum.